## DAGSINS MEINING

# Nú er nokk

Nú hava vit í 3 ár lurtað eftir retorikkinum um tann søguliga møguleikan. Vit liva í einari søguligari tíð er proklamerað fleiri ferð. Nú er tað tíbetur soleiðis, at tað ikki er samtíðin, ið skrivar søgu, men eftirtíðin.

Leiðslan í Tjóðveldisflokkinum hevur ført fram, at einki er hent á sjálvstýrisleið síðani heimastýrislógina. Hesir menn føra ferð eftir ferð fram, at vit eru alsamt gjørd meira og meira tengd at blokkstuðulinum frá Danmark. Nú er tað soleiðis, at blokkstuðulsskipanin ikki hevur meira enn 12 ár á baki, og at hon gjørdi Føroyar minni tengdar at Danmark búskaparliga enn støðan var við refusiónsskipanini, ið var áðrenn.

Tær yvirtøkur og tær broytingar, ið hava verið tey seinastu nógvu árini skyldast tógvið stríð hjá undangongumonnunum hjá núverandi Løgtingi. Postkassarnir hava ikki altíð verið bláir, og skúlafyrisiting hevur ikki altíð verið føroysk. Tað er týdningarmikið at man ikki tekur alt sum eina sjálvfylgju. Teir tinglimir og landstýrismenn – inklusiv tjóðveldismenn – sum tóku hesi tøk hava heiður uppiborið. At so Høgni Hoydal og nýggi vongurin í Tjóðveldisflokkinum niðurger sínar egnu, ið gingu undan er sín søk, men enn meira ótrúligt er tað, at sami Høgni Hoydal og hansara vongur í Tjóðveldisflokkinum undirmeta eftirkomarar. Hesir menn blíva við at føra fram, at um fullveldið ikki kemur í hús í hesum valskeiðnum, so er alt dottið á gólvið fyri altíð.

Tað tykist sum um at eingin hevur gjørt nakað á sjálvstýrisleið áðrenn Høgni Hoydal var uppfunnin, og eingin kemur at megna nakað eftir Høgna Hoydal.

Búskaparargumentið verður mangan ført fram av Tjóðveldismonnum, men hví hettar skal vera seinastu ferð, vit nakrantíð hava góðar tíðir í Føroyum, hava teir ikki nakað svar uppá. Tað er einki hendan samgonga kann, sum fylgjandi samgongur ikki kunnu.

Okkara vón skal vera, at menn gevast við hesari ótrúlligu yvirvurdering av egna leikluti í søguligum høpi. Eitt valskeið er eitt sekund í søguni, og framburður og økt sjálvbjargni er ein process, har løgting aftaná løgting standa á herðunum, á teimum, ið undan fóru. Nú er nokk! Nú er nokk við at ignorera 50 ára framburð. Nú er nokk við at fyrigykla fólki, at man er í einari nú ella aldrin støðu. Nú er nokk við at taka alt, ið hóast alt verður umsitið í hesum landinum sum eina sjálvfylgju. Nú er nokk við at dyrka undirbrotligheitina, har einki ber til uttan fullveldi. Sum ein av okkara fremstu løgfrøðingum segði herfyri: Man skal bara trúgva uppá seg sjálvan, so ber alt til.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Norrønt Atlantssamstarv hevur fingið nýggjan stjóra



Nýggi stjórin í Norrøna Atlantssamstarvinum (NORA) eitur Kaspar Lytthans. Hann hevur í mong ár starvast hjá Grønlendska Heimastýrinum, og seinastu árini í Vinnudeildini hjá Direktoratet for Erhverv, har hann hevur arbeitt við vinnumenningarmálum, økispolitikki o.ø. Hann hevur eisini leingi umboðað Grønland í ymiskum nevndum undir Norðulendska Ráharraráðnum og er soleiðis kendur í norðurlendskum høpi.

Kaspar Lytthans er fólkalívsfrøðingur og er 52 ára gamal. Hann er dani, men búði í barnaárunum í Grønlandi, hagar hann flutti aftur í 1984 og hevur búð síðani.

Høvuðsuppgávan hjá nýggja stjóranum verður at seta nýggju langtíðarætlanina hjá Norrøna Atlantsamstarvinum í verk.

Norrøna Atlantssamstarvið er ein verkætlan undir Norðurlendska Ráðharraráðnum, ið stuðlar samstarvsverkætlanum millum fyritøkur í Grønlandi, Íslandi, Føroyum og Strandanoregi. Í langtíðarætlanini fyri 2001 til 2006 verður dentur lagdur á at stuðla menningar- og nýskapanartilgongdum í vinnuni í samstarvslondunum. Hetta verður millum annað gjørt við at stuðla vinnuligum menningarætlanum og at stuðla uppundir førleikamenning og netverkssamstarv millum fyritøkur í londunum.

Norrønt Atlantsamstarv stendur eisini á gáttini til eitt samstarv við »Northern Periphery« verkætlanina (Norðurmót verkætlanin). »Norðurmót« er ein menningarverkætlan í økisætlanini INTERREG IIIB hjá ES. Upprunaligu samstarvspartarnir í Northern Periphery vóru Skotland, Norra, Svøríki og Finland. Grønland, Ísland og Føroyar – luttaka í verkætlanini frá í ár. Í hesum sambandi verður NORA-nevndin ráðgevingarbólkur hjá Northern Periphery.

Samstarvið við Northern Periphery verður ein spennandi avbjóðing fyri Norrøna Atlantsamstarvið og fyritøkurnar í útnorðurlondunum, sum við hesum fáa betri møguleikar fyri samstarvi við fyritøkur í grannalondunum fyri sunnan.

# Leguhúsið Lívd selt

**Kirkjuliga Missiónsfelagið ætlar at útvega eini nýggj hús í útjaðaranum til leguvirksemi**

LEGUHÚS
*Turið Kjølbro*

Seinastu 20 árini hevur Kirkjuliga Missiónsfelagið átt og rikið leguhúsið Lívd í Haldórsvík. Húsini hava verið brúkt til summarlegur, bíbliuskeið og onnur tiltøk. Umstøðurnar hava verið góðar, men av tí at húsini eru vorðin gomul og tí tørva ábøtur, hevur Kirkjuliga Missiónsfelagið gjørt av at selja húsini til Haldórsvíkar kommunu. Hetta stendur at lesa í blaðnum hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum.

Enn hevur Kirkjuliga Missiónsfelagið ikki útvegað nýggj leguhús. Tað er annars ætlanin, og felagið miðjar eftir at ogna sær eini hús ella at byggja eini stór sethús við hampiliga stórum øki rundan um í einari bygd í útjaðaranum.


## Takk

En hjertelig takk til alle jer, som fulgte min elskede søn, vores kære bror og svoger

**Jens Josiassen**

til hans siste hvilested.

*Hilsen*
**Gudrun, Siri, Eigil,
Tilda, Egon, Seljan og Søren**



## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum sýndu mær samkenslu og stóra hjálp, tá mín elskaði

**Jens Josiassen**

so brádliga varð tikin frá mær. Takk øll somul, sum vístu so ótrúligt hjálpsemi. Takk fyri gávur og takk fyri blómur. Takk fyri alla hjálp í heiminum. Takk til tykkum øll, sum fylgdu. Takk til prest, gravarar, sangarar, klokkara og berarar. Gud vælsigni tykkum øll fyri ta hjálp, tit vístu mær.

**Mia Christiansen**



Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Vit eru blivin meiri sjónlig

**Tey fimm árini, Joan Ziskason hevur verið formaður í Sjúkrasystrafelagnum hava verið baldrut og strævin, men eisini lærurí. Nú bjóðar hon seg fram at taka eitt tørn afturat.**

STRÍÐSVAL
*Áki Bertholdsen*



*– Eitt, sum vit mugu gera okkum púra greitt, tað er, um vitr skulu hava eina nýggja lønarskipan, sigur Joan Ziskason, sum er annað valevni til formansvalið í Sjúkrasystrafelgnum.*

– Vit eru blivin meiri sjónlig og vit hava fingið meiri virðing. Men tað skal eisini síggjast á lønini.

Joan Ziskason, sum er forkvinna í Sjúkrasystrafelag Føroya, heldur, at lønin hjá sjúkrasystrunum er alt ov lág.

– Og tað er langt á mál til eina nøktandi løn. Ein nøktandi løn er ein løn, ið svarar við ábyrgdina, sigur Joan Ziskason

Hon hevur verið forkvinna í Sjúkrasystrafelagnum í fimm ár.

– Hetta hevur verið ein baldrut, men eisini ein spennandi og lærurík tíð. Tað er sera nógv at seta seg inn í sum formaður, bæði lógir, reglugerðir, og ikki minst, hvussu sáttmálin skal tulkast, so ein blívur ein hálvur løgfrøðingur í hesum starvinum, sigur hon. Hon ásannar, at tað sum aðrir formenn søgdu við hana, um at tað tekur minst tvey, trý ár at seta seg inn í formansstarvið, var rætt.

– Tað hava verið átta landsstýrismenn í almanna- og heilsumálum í míni formanstíð, og tað sigur seg sjálvt, at hetta gjørt, at onkur mál eru ikki loyst so skjótt, sum vit hava viljað. Hesi árini, Joan Ziskason hevur verið forkvinna í sjúkrasystrafelagnum eru stórar sparingar framdar í heilsuverkinum, og meginsjúkrahús okkara, Landssjúkrahúsið, lá í leiðsluloysi.

Men júst í málinum um leiðsluviðurskiftini á Landssjúkrahúsinum, vann Sjúkrasystrafelagið ein av teimum stóru sigrunum í formanstíðini hjá Joan Ziskason. Men tað kravdi bæði drúgvar samráðingar, og enntá verkfall: Tað var, tá ið treytaleysa kravið um eina sjúkrasystir í ovastu leiðsluna á Landssjúkrahúsinum, varð gingið á møti.

Sjúkrasystrafelagið fekk norðurlendskan limaskap 1. januar 1998. Formaðurin hevur verið fastur fyrilestrarhaldari og bólkaleiðari á fakpolitisku ráðstevnunum, sum hava verið í teimum ymisku norðanlondunum hvørt heyst.

Joan Ziskason er 44 ára gomul. Hon varð útbúgvin sjúkrasystir í 1985 og hevur síðani drúgvar og fjølbroyttar arbeiðsroyndir, bæði í Føroyum og uttanlands. Hon hevur verið sjúkrasystir á ymsum deildum á Landssjúkrahúsinum og á eini deild fyri krabbameinssjúklingar á Ríkissjúkrahúsinum. Hon hevur eisini verið lærari á Sjúkrasystraskúlanum. Seinastu árini hevur hon verið ráðgevandi sjúkrasystir hjá Føroya Felag móti Krabbameini, haðani hon hevur farloyvi ímeðan hon er formaður í Sjúkrasystrafelagnum.

Hon er eisini formaður í sjeymannabólkinum hjá fakfeløgunum. Hetta er ein bólkur, sum umboðar eini 32 fakfeløg. Í hesum arbeiðsbólki er Sjúkrasystrafelagið við í tøttum samstarvi við flest øll onnur fakfeløg í Føroyum. Samstarvið er sera gagnligt tá umræður kjakinum um fakfelagspolitikk, og hevur lætt um arbeiðið, tá viðmerkingar skuldu gerast um førdan landspolitik.

### Nógv á láni

Joan Ziskason sigur, at eitt av høvuðsmálunum í komandi tíðum, verður sáttmálasamráðingarnar, sum verða um eitt ár. Og tá hugsar hon serliga um lønina.

– Seinast, vit samráddust, varð ein ávísur bati gjørdur í lønini, men enn liggur nógv á láni. Eitt nú mugu vit gera okkum heilt greitt, um vit skulu royna at fáa eina nýggja lønarskipan, eins og tey hava í hinum norðanlondunum.

Hon sigur, at nógv talar fyri eini slíkari skipan, men har eru eisini fleiri vansar.

– Men er ein nýggj lønarskipan einasti vegur til eina munagóða lønarhækking, kunnu vit ikki annað enn taka undir við henni. Men tað verður sjálvandi bara um sjúkrasystrar taka undir við tí.

Hon sigur, at í komandi samráðingar mugu eisini onnur mál verða tikin upp, sum tey ongantíð komu til í seinastu samráðingum, eitt nú styttri arbeiðsvika, hægri viðbøtur fyri kvøld- og náttarvaktir, seniorpolitikk og mangt annað.

– Eitt mál, sum miðvíst má arbeiðast fyri er, tað, vit nevna bilamálið hjá Heimarøktini. Sjúkrasystrafelagið hevur við jøvnum millumbili tikið málið upp, men hevur tær seinastu ferðirnar fingið at vita, at bilamálið er ein leiðsluspurningur.

Málið snýr seg um at útvega heimarøktini bil at brúka í arbeiðstíðini.

– Eg veit ikki um nakar kundi hugsað sær, at postboðini fóru til arbeiðis í ongum bili, sigur Joan Ziskason.

Hon sigur, at gongd kom á málið, tá ið ein bilur bleiv keyptur til heimasjúkrasystrarnar í Suðurstreymoy.

– Men so steðgaði upp og nú kemur aftur undan kavi, at Sjúkrasystrafelagið eigur at taka málið upp við Fíggjarmálastýrið, tí nú er tað brádliga ikki ein leiðsluspurningur longur.

Hon heldur eisini, at tíðin er komin at skipa fyri sjúkrasystraráðstevnu aftur. Hon heldur, at hetta eigur at vera fastur táttur hjá felagnum, annað- ella triðjahvørt ár.

– Ein sjúkrasystraráðstevna, við fakliga sterkum fyrilesarum, vil geva ein mennandi íblástur til limir felagsins. Tað hevði eisini verið mennandi við eini tvørfakligari ráðstevnu, heldur Joan Ziskason. Annars hevur hon eitt valupplegg í fakblaðnum hjá Sjúkrasystrafelagnum, »Vøku«.

# Stórar avbjóðingar standa fyri framman

**Jana H.Dalsgaard hevur bjóðað Joan Ziskason av, nú sjúkrasystrar skulu velja nýggjan formann**

STRÍÐSVAL
*Áki Bertholdsen*



*Jana H. Dalsgaard heldur, at tað er rætt at vísa áhuga fyri fakfelagsarbeiðnum. Tað ger hon við at stilla upp til formann*

– Lønin er ov lág og arbeiðstíðin ov long.

Verður Jana Højgaard Dalsgard nýggur formaður í Sjúkrasystrafelagnum á aðalfundinum 17, mars, eru hetta tvey viðurskifti, sum hon ætlar at bøta um. Jana H. Dalsgaard hevur nevniliga bjóðað Joan Ziskason av, nú sjúkrasystrar aftur skulu velja formann.

Joan Ziskason hevur verið formaður í sjúkrasystrafelagnum í fimm ár nú. Fyrra valskeiðið var tvey ár, men síðani er tað broytt til trý ár.

Seinast, Joan Ziskason varð vald, hevði hon onki mótvalevni , men tað fær hon so hesuferð.

Jana H. Dalsgaard býr í Havn og er 45 ára gomul.

Hon hevur longu drúgvar royndir, bæði sum sjúkrasystir og fakfelagsfólk. Hon varð útbúgvin sjúkrasystir í 1981 og arbeiddi síðani á Landssjúkrahúsinum til 1997. Í 1997 og 1998 var hon í Danmark, har hon las løgfrøði, og tað helt hon fram við í sjálvlsestri til í 1999. Samstundis er hon sjúkrasystir í læknaviðtaluni hjá D. P. Højgaard, kommunulækna, har hon eisini arbeiðir í løtuni. Men hon hevur eisini vaktir á Landssjúkrahúsinum og í Heimarøktini.

Meðan hon var á Landssjúkrahúsinum frá var hon álitisfólk fyri sína deild í sjey ár. Í fimm ár var hon eisini felagsálitisfólk fyri alt landsjúkrahúsið.

– Størsta uppgávan hesi árini var var at arbeiða við við viðurskiftunum hjá sjúkrasystrunum, og royna at verja sjúkrarøktina, tá ið tær stóru stóru skerjingarnar vóru í kreppuárunum. Tá sat hon m.a í einum fýra-manna manna bólki, sum umboðaði alt Landssjúkrahúsið.

Á vári í 1996 varð hon vald í nevndina í Sjúkrasystrafelag Føroya, har hon sat til hon fór niður árið eftir

Hesa tíðina vann Sjúkrasystrafelagið ein stóran sigur í ósemjuni um nýggja leiðslubygnaðin á Landssjúkrahúsinum, tí úrslitið var, at ein røktarfakligur leiðari kom í ovastu leiðsluna.

Jana Dalsgaard var eisini við til at gera eitt uppskot fyri landsstýrið um nýggjan leiðslubygnað á Landssjúkrahúsinum, saman við aðrari sjúkrasystir og tveimum læknum.

### Størri vitan

Hon sigur, at sum samfelagið broytist, broytast eisini uppgávurnar hjá sjúkrasystrini.

– Í dag eru sjúklingarnir sjálvir førir fyri at søkja sær vitan á alnetinum um sjúkur, viðgerðarmøguleikar og røkt. Hetta setur stór krøv til sjúkrasystrina, tí tað krevur, at hon støðugt mennist fakliga og hevur eina dagførda vitan.

– Eisini er gongdin tann, at viðgerðir og røkt í nógv størri mun verða givin givin ambulant, tvs, at sjúklingurin er ikki innlagdur. Hetta setur so eisini onnur krøv til sjúkrasystrina, og tað krevur eisini, at heimarøktir verður útbygd.

– Vit noyðast eisini at brynja okkum til, at tað verða fleiri og fleiri eldri í samfelagnum.

– Tað, sum ger sjúkrasystrarnar betur førar fyri at taka ímóti teimum stóru avbjóðingunum, ið standa fyri framman, er størri vitan.

– Vit eiga fyrst og fremst sjálvar at søkja okkum vitan, tað verið seg við at lesa, vera á skeiðum og annars útbúgva okkum alla tíðina.

– Sjúkrasystrafelagið eigur avgjørt at vera við til at geva sjúkrasystrum størri vitan, eisini fakliga. Tað kann gerast við at vit oftari skipa fyri limafundum, evnisdøgum, og skeiðum. Vit eiga at stuðla sjúkrasystrum at útbúgva seg víðari. Stuðulin, hon hugsar um, er ikki fíggjarligur, men moralskur. Felagið kann eisini hjálpa til at útvega upplýsingar, o.s.fr.

### Hægri løn og styttri arbeiðstíð

Jana Dalsgaard sigur, at hon hevur gjørt av at stilla upp, tí hon hevur stóran áhuga fyri viðurskiftunum hjá sjúkrasystrunum og fyri fakfelagsarbeiði.

–At vera formaður í Sjúkrasystrafelagnum er strævið. Og tá ið sami formaður hevur lagt rygg til í fimm ár, haldi eg, at onnur eiga at vísa áhuga og at bjóða seg fram. Og at stilla upp til formansval og nevndarval er ein máti at vísa áhuga fyri felagsarbeiðnum, sigur hon.

Og tá ið hon bjóðar seg fram, er tað tí, at hon heldur, at hon kann verða við til at bøta um korini hjá sjúkrasystrum í Føroyum, og at menna heilsu- og sjúkrarøktina.

Eitt nú hugsar hon um arbeiðsumhvørvið, um fakliga og persónliga menning og um lønar-, setanar-, og fyriskipanaráhugamál. Men hon hugsar eisini um at savna sjúkrasystrarnar í Føroyum, um at fremja gott samanhald felagsliga og fakliga, um at stuðla teimum lesandi og um at stuðla teimum eldru.

Eitt nú heldur Jana Dalsgaard, at lønin hjá sjúkrasystrum als ikki samsvarar við arbeiðsuppgávurnar og stóru ábyrgdina.

– Grundlønin er ov lág og alt eykaarbeiði, eitt nú arbeiði um kvøldið, um næturnar og halgidagar, eigur at geva meiri. Ein máti at lætta um hjá eldri sjúkrasystrum, er at stytt arbeiðstíðina hjá teimum við somu løn. Eg haldi eisini, at arbeiðstíðin eigur at vera 37 tímar un vikuna.

Annars hevur Jana Dalsgaard eitt valupplegg í »Vøku« sum er fakblaðið hjá sjúkrasystrunum.


## Landsfundur Sambandsfloksins 2001

verður í Havn 23.-24. mars.
Uppskot til viðgerðar á landsfundinum skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 13. mars.
Øll sambandsfólk eru vælkomin
*Nærri verður lýst seinni.*

**Landsnevndin**